## DAGSINS MEINING

# Summar, sól og festivalar

So kom summarið langt um leingi eftir nakrar mánaðir við mestsum vetrarkulda. Fólk hava sagt í jaligari merking, verið sum hamskift av góða veðrinum. Eitt, sum hevur eyðkent summarið, er, at nú eru fleiri festivalar umframt vanligu siðbundnu stevnurnar. Festivalarnir eru eitt sera kærkomið og upplívandi ískoyti til stevnurnar. Meðan stevnurnar mest snúgva seg um ítrótt, so eru festivalarnir eyðkendir av tónlistarligum og øðrum listarligum tiltøkum.

Festivalurin yvir øllum er Listastevnan í Havn, men lat tað verða sagt alt fyri eitt, at festivalarnir úti á bygd standa ikki aftanfyri í dygd og fjølbroytni, bert í vavi og tað ger minni. Listastevnaner eitt fantastiskt tilboð til føroyingar. Her hava vit eitt einastandandi høvi at koma í samband við altjóða list innan mangar listagreinir, eingin nevnd og eingin gloymd. Samstundis hava vit høvi at møta nøkrum av tí besta í føroyskari list. Hetta er sera gott fyri bæði list og almenning. Í ár var úrskrivað skaldsøgukapping. Hetta var eitt frálíkt hugskot og skal blaðið við hesum nýta høvið at ynskja Oddvør Johansen hjartaliga tillukku við virðislønini. Ein slík kapping kann stimbra áhugan hjá skrivandi fólki. Nú verður spennandi, hvat  kappingin næsta ár fer at hava sum evni.

G-festivalurin, summarstevnan í Fuglafirðri, Summarfestivalurin í Klaksvík og onnur tiltøk eru eisini sera spennandi íkast til heildarmyndina av festivalum í ár. G-festvalurin og summarstevnan  í Fugalfirðu vóru, so ymisk annars, ómetaliga flott tiltøk, og eru tey ivaleyst komin fyri at vera. Nú er so summarfestivalurin í Klakksvík eftir. Fyrireikararnir møta við einum framúrskarandi programmi, ið røkkur frá Hensley til Johan í Kollafirði. Jú klaksvíksingar og teir mongu gestirnir, ið ivaleyst fara at streyma til Summarfestivalin, hava nógv og góð tónleikatiltøk at gleða seg til. Vit ynskja fyrireikarunum góða eydnu við tiltakinum komandi dagarnar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Til lille Peter

**Elias Joensen**

Jeg skriver dette for minne jer på, at det er jer, der er til for os og ikke vi, som er til for jer, for så skal der skiftes nogle stole ud, men I burde skamme jer, at I tænker mere på jer selv, end på de ringeste stillede såsom Peter at sige, at Gunvør ikke kan klare det, det er en stor løgn, for det kan hun godt, men for at åbne jeres øjne, sender jeg her en sang, som I må lægge jer på sinde og tænke over, hvad det er, I er igang med.

af savnde
de grå og røde huse
for dem der har det ont
De grå og røde huse
i Byens dybe favner
hjemsted for en lille flok
hvis liv består
vil altid stå i stråleglans
for dem der tænker sundt

lidt solskind giver kraft og mod
til store som til små
og lyser op på denne jord
som oftes syntes grå
man finder også solskind
i hvert lille kærligt ord
som bringer glæde til hver sjæl
der bor på denne jord

hver skovens hjort og hare
lever frit og uden tvang
Mellem Åndens svage
som har samme trang
de grå og røde huses dyst
for dem der har det ondt
vil altid stå i stråle glans
for dem der tænker sunt

i underskoven kæmper busk
og urt mod træers magt
og kampen føres ganske stille
stadig uforsagt
vor kamp blir altid ført for dem
der har det hårt og svært
og mange nederlaghar stor
tålmodighed os lært

*Skrevet af Elias Joensen*

# Skjýtur fyrst og spyr aftaná

**Tíðindaskriv**
*Starvsfólkini í ÚF*

**Tórshavn 10. august 2004**

Starvsfólkini í Útvarpi Føroya hava fyrrapartin viðgjørt støðuna, nú landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, hevur boðað frá, at Útvarpið og Sjónvarpið skulu leggja saman tann 1. januar 2005. Starvsfólkini taka til eftirtektar politisku avgerðina hjá Jógvani á Lakjuni um at leggja saman Útvarpið og Sjónvarpið í ein almennan kringvarpsstovn.

Men starvsfólkini átala óhepnu framferðina hjá landsstýrismanninum í hesum máli.

Samanleggingin tykist vera ófyrireikað, og avgerðin um hana tikin í skundi.

At tað, sum frá líður, verður betri við einum stovni kunnu starvsfólkini á báðum almennu loftmiðlunum bara vóna, tí landsstýrismaðurin kann ikki vísa til nakra kanning, sum gevur ábendingar um, at ein stovnur er betri enn tveir.

Hvørki starvsfólk í SvF ella í ÚF fingu nakað at vita frammanundan um samanleggingina, og tí kennist tað sum landsstýrsmaðurin fyrst skjýtur og síðani spyr.

Og løtan at boða frá slíkari stórhending var eisini óheppin, seinasta arbeiðsdag fyri vikuskifti um hásummarið, tá nógv starvsfólk eru í summarfríi.

– Vit átala og harmast um knortlutu framferðina hjá landsstýrismanninum og Mentamálaráðnum í hesum málinum, og vit leggja dent á, at vit eiga at vera við í fyrireikingunum, sum nú byrja, frá fyrsta degi. Okkara partur skal ikki liggja eftir, siga starvsfólkini í Útvarpi Føroya.

Samstundis vóna starvsfólkini, at fíggjarliga støðan hjá ÚF og umstøðurnar yvirhøvur verða ikki verri, nú ÚF og SvF skulu leggjast saman. Tí so er meira tapt enn vunnið.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax  341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




Listastevnan:

# Eitt samfelag uttan livandi list er steindeytt og turrgelt

**Hetta segði Ólavur Rasmussen, prestur, millum annað í sera hugtakandi røðu, tá hann setti tann partin av Listastevnuni, sum er í Gallarí Oynni á Tvøroyri. Har sýna listafólk úr Føroyum og Danmark fram**

LISTASTEVNA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Zacharias Heinesen, Stine Ring Hansen og Steffen Luttge sýna fram í listaskálanum á Tvøroyri - Oyggin - í hesum døgum.

Framsýningin í Oynni er partur av listastevnuni. Stine er 36 ár og mett at teljast millum evnaríkastu ungu høggmyndlistafólkini í Danmark.

Steffen er 59 ár og hevur í meira enn 40 ár fingist við høggmyndlist og hevur havt framsýningar kring alt Europa.

Umframt at fáast við høggmyndlist og sýna fram saman, eru tey bæði eisini gift.

Zacharias er føddur í 1936 og málar landsløg, ið ofta eru skipað í kubistiskar formar. Flestu føroyingar kenna verk hansara og sagt hevur verið, at hann fær oyggjar okkara at síggja út, sum eru tær flótandi oyggjar.

### Ólavur setti stevnuna

Ólavur Rasmussen, prestur í Leirum í Hvalba, setti hendan partin av Listastevnuni og hann fegnaðist í áhugaverdari røðu um at fáa loyvi at seta stevnu og framsýning.

Hann segði m.a., at torført er at definera list, eins og tað er torført at definera sjálvt lívið. Bæði hava tað til felags, at tey eru torfør at seta í bás og verða tey tað, so verða tey kvald.

Ólavur Rasmussen endurtók ymiskt eftir Kierkegaard og tað var eisini hann, ið segði, at lívið er sum eitt flot. Tey flestu sita sum sílafiskarar við áarbakkan og hyggja at flotinum. Listafólk hava hinvegin ikki áhuga í flotinum, men í tí, sum fyriferst á botni, og samanbar Ólavur hereftir listafólk við eina á, har tey ungu eru sum áarføri og í støðugari leitan, men allur originalitetur byrjar sum kopi. Máað verður av lívsins áarbakkum og at enda rennur vatnið við minni ferð og er klárari, men ein kann enn granska í hesi mynd av ánni, sum tykist so løtt, men sum tó er meira, og í fragd um listina hoyrast dunini frá fossinum, sum ein veit streymaði ígjøgnum penslastrokini.

Eitt samfelag uttan livandi, skapandi list er eitt steindeytt og turrgelt samfelag og bara hann, sum ræðist lívið, ræðist listina, metti Ólavur.

Ólavur greiddi frá sínum tilknýti til listamannin Zacharias Heinesen. Sum prestur í Suðurslesvik søkti ólavur grunnar um pengar til nýggja kirkju til donsku meinigheitina í Husum. Mærsk Mckinney Møller vildi fegin gjalda alt sjálvur. Fegin um hesi gleðiboð ringdi Ólavur Rasmussen til Zacharias og heitti á hann um at mála altartalvu og bleiv hann harvið hin fyrsti føroyingur at mála talvu til kirkju uttanlands, tað Ólavur veit um.

Ein krókur í Leirum er settur av og har hanga útkast til altartalvuna og tey fegnist eg um hvønn dag, segði Ólavur Rasmussen millum annað.

Heimsspekingurin William James gekk ein dagin túr í Cambridge, hetta er á leið í ár 1900. Saman við honum vóru tveir studentar, genta og drongur. Ímóti teimum kom hábærsligur maður við hvítum skeggi, hann bar hatt og svingaði stavinum aftur og fram. Hann var sjónliga burur í øðrum heimi. „Líkamikið hvør hasin er, so er hann ímyndin av einum fráverandi professara", segði gentan.

Tá segði James; Tað tú veruliga meinar er, at hann er nærverandi onkra aðrastaðni.

So skjótt kunnu orð, strofur og strikur flyta okkum, tá fordómar fella, segði Ólavur Rasmussen millum annað, tá hann setti Listastevnu í Gallarí Oynni á Tvøroyri.





*Zacharias Heinesen, Stine Ring Hansen og Steffen Luttge sýna fram í listaskálanum á Tvøroyri - Oyggin - í hesum døgum.*

*Mynd: Leivur Nygaard*

# Tutl í samstarvi við Tonart í Sveis

**Mest sum av tilvild er samstarv komið í lag millum føroyska plátufelagið Tutl og tónleikahugaðar menn í sveis. Ein ferðamaður í Føroyum gjørdist hugtikin av føroyskum tónleiki og setti seg í samband við vinmann sín, sum hevur fløguhandil. Úrslitið er, at føroyskar fløgur nú verða førdar fram í Sveis og virksemið hesum viðvíkjandi tykist at breiða seg við miklari ferð, sum ringar í vatni**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í Sveis eru fólk veruliga við at fáa eygu og oyru upp fyri føroyskum tónleiki og framstigini eru løtt at síggja í arbeiðinum at føra føroyskan tónleik fram har. Men alt byrjaði av tilvild.

Ein ferðamaður úr Sveis, Felix vandenBerg, gjørdist á eini ferð í føroyum í januar í ár so hugtikin av føroyskum tónleiki, at hann gjørdi av at gera meira við hetta.

Við sær heim hevði hann føroyskar fløgur og setti seg í samband við vinmannin Roger Ray, sum hevur fløguhandilin Tonart. Saman hava hesir nú roynt at føra føroyskan tónleik fram í Sveis og fyribils er úrslitið, at samstarv er við Tutl og at Høgni Lisberg og seinni Ygdrasil skulu til Sveis at spæla.

### Tónleikur og fótbóltur

Fyrst í september fer Høgni Lisberg at spæla í Sveis. Tann 4. september spæla føroyingar eisini fótbólt har, so nógv verður gjørt burtur úr tann dagin. Høgni við bólki skal spæla 2., 3 og 4. september og einsamallur 5. og 9. september og verður tað í St. Gallen, Basel og aðrastaðni. Í november fer bólkurin Ygdrasil til Sveis at spæla.

### Blaðmaður á vitjan

Teir báðir mennirnir í Sveis eru eldhugaðir og hava fingið onnur við sær. Sveisiskt sjónvarp hevur víst tiltøkunum áhuga og somuleiðis útvarp. Og í næstum kemur ein blaðmaður úr sveis til Føroya at kunna seg um Føroyar, mentan og tónleik. Eisini er ein útvarpsrás, sum ætlar at leggja seg meira eftir at senda norðurlendskan tónleik.

- Fyri fyrst hava teir lagt seg eftir at nýta mína fløgu og nakrar aðrar fyri at føra føroyskan tónleik fram, sigur ein vælnøgdur Høgni Lisberg, sum fegnast um stóru framstigini í hesum samstarvinum, sum jú ikki er ársgamalt enn.

- Eins og hjá okkum, so er í stóran mun talan um idealistiskt arbeiði, tí stóri peningurin er ikki tøkur, men fleiri ummæli og greinar eru skrivað í tíðarrit og bløð, so hetta breiðir seg, sigur Høgni.




*Tonart selur føroyskan tónleik í Sveis og hyggur ein væl, so sæst fløgan hjá Høgna Lisberg og aðrar føroyskar fløgur í handilsvindeyganum. Ferðamaðurin Felix setti samstarvið við Tutl í gongd og handilsmaðurin Roger tók fegin við. Teir báðir síggjast á myndini. Í dag er rættilig ferð á arbeiðinum at føra føroyskan tónleik fram í lítla landinum mitt í Europa*

### Støðug brúgv

Høgn Lisberg er eisini spentur uppá, hvat hetta kann føra til.

- Tað hevði verið stuttligt, um hetta gjørdist ein støðug brúgv, sum kann virka báðar vegir. Hetta byrjar at líkjast tí, sum hendi í Íslandi, har føroysk bylgja tók seg upp. Fólk eru sera áhugað og hetta er jú í miðum Europa, sigur Høgni Lisberg, sum um ein mánað spælir sín tónleik fyri áhoyrarum í Sveis.